## Hava skapt kapping

Sum nevnt er Kaj Leo Johannesen til reiðar at kommitta seg til Farex, um loysnin av umskipan og umlegging av felagnum annars vísir seg burðardygg. Og tað hevur týdning, at felagið framhaldandi kann verða við í kappingini á marknaðinum. – Kapping er sum kunnugt sunn og er við til at halda prísstøðinum, og tað hava vit verið við til at gjørt seinastu tíggju árini, sigur Kaj Leo Johannesen, nevndarformaður í Farex.



## Eg eri til reiðar

Í sambandi við kreppuna, sum Farex er komið í, hevur ljóðað, at ein av høvuðseigarunum, Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum, ikki vildi seta meiri pening í felagið. Men hetta avsannar hann. – Eg eri til reiðar at seta meiri pening í felagið. Eg havi ikki verið aktivur í felagnum seinastu fýra árini, men eg eri nevndarformaður og havi tí eisini ábyrgd. Eg havi fult álit á Róa Egholm, og havi dámt væl tær loysnir og uppskot til loysnir, sum higartil eru komnar fram. Men tað er eyðsæð, at tað skulu aðrir íleggjarar til, tí tað er neyðugt við einum peningasterkum felag, skulu vit standa okkum í altjóða kappingini, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Tungt ár hjá Fiskavirking

**Meinhard Jacobsen, stjóri á Faroe Seafood, dylur ikki fyri, at árið í fjør var tungt. – Men tá vit deils avskriva óvirkin virðir, deils ikki sleppa at fiska og deils ikki fáa fiskin arbeiddan, tá vit hava hann, so má tað blíva tungt, sigur hann**

FISKIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Stjórin á Faroe Seafood, Meinhard Jacobsen, hevur verið noyddur at endurskoða tær annars rímiliga bjørtu vónirnar fyri 2008, nú árið byrjaði við einum verkfalli hjá fiskimonnum*

Eftir eitt tungt 2007 vóru vónirnar heilt rímiligar til árið í ár hjá Faroe Seafood.

- Ja, nú vóru vit til reiðar at taka eitt veruligt tak. Alt var klárt, góð skip og góðar manningar, so vit vóru rímiliga optimistiskir, eisini hvat prísunum viðvíkur. So at vit nú skulu byrja við einum verkfalli er eitt rættiligt skot fyri bógvin, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Faroe Seafood.

So seint sum beint undan jólum komu nýggjastu trolararnir hjá felagnum til landið, og millum annað tað skapti optimismu fyri komandi ár.

Felagið hevði í fjør havt stórar trupulleikar við deils at fáa fiskin til lands, og – tað sum verri var – at fáa hann arbeiddan, tá hann var har. Tískil hevur ikki borið til at levera vøruna, og virkini hava staðið óvirkin. Hetta hevur verið ein stórur trupulleiki og ein tungur postur í roknskapinum, tí neyðugt hevur verið at avskriva óvirkin virðir.

- Hetta er nakað, sum tyngir ógvuliga nógv í roknskapinum, tí her er talan um tveysifraðar millióna-upphæddir. Tað merkir kortini ikki, at samlaða undirskotið verður so stórt, men at tað verður eitt undirskot, rokni eg við, sigur Meinhard Jacobsen.

### Vátan vøttin

Sum nevnt vóru vónirnar fyri hesum nýggja árinum rættiliga góðar, ikki minst við nýggja parinum, sum kom í flotan beint undan jólum.

- Tað er serliga hendan tíðin, at væl er at fáa. Januar er rættilig inntøkutíð hjá bæði skipum og manningum, og harvið sjálvandi eisini vikjunum. Tí er tað nærmast katastrofalt, at missa hesa tíðina orsakað av verkfalli. Tað er sum at fáa vátan vøttin beint í andlitið, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann vísir á, eins og Mikkjal Hammer gjørdi í blaðnum í gjár, at januar mánaði ofta roynist framúr væl, og tí rakar eitt verkfall júst hesa tíðina serstakliga hart, ikki bert hjá øllum í vinnuni, men eisini í samfelagnum sum heild.

Tað sigur seg tí sjálvt, at stjórin í Faroe Seafood hevur verið noyddur at endurskoða vónirnar fyri 2008.

- Tað tykist í løtuni vera ómøguligt at siga, nær verkfallið endar, so tað sær út til, at vit kunnu verða noyddir heilt niður á botn at venda, sigur Meinhard Jacobsen.

### Mist vónina

Verkfallið er eitt, men har kann so roknast við einari loysn fyrr ella seinni. Verri heldur stjórin á Faroe Seafood tað stendur til við aftvurvendandi trupulleikanum at fáa manna flakavirkini.

- Eg havi avskrivað, at tað koma broytingar í útlendingalógina. Har tykist stutt sagt ikki at vera nakar politiskur vilji til at loysa hetta málið, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann sigur, at skaðin langt síðani er hendur í flakavirkisvinnuni, men hann væntar kortini ikki, at nakað verður gjørt, fyrr enn alt samfelagið er um at stegða upp. Tí tað er tann føroyski mátin, sum hann málber seg.

Og júst av tí sama skal tað undra hann nógv, um føroyingar fara at merkja nakran búskaparligan vøkstur í ár.

- Sum støðan er dugi eg als ikki at síggja nakra uppgongd. Vantandi loysn á útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum hevur longu kosta flakavinnuni ótrúliga nógv. Vit klára at virðisøkja hvørt kilo av upsa 100%, so keypa vit hann inn fyri 6 krónur, flyta vit hann út fyri 12. Og er politiski myndugleikin ikki áhugaður í tí, so er tað bara heilt burturvið, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood.

# Rúsdrekkasølan økt

**Rúsdrekkasøla Landsins boðar frá stórum vøkstri í søluni, bæði hvat krónum og nøgd viðvíkur**

RÚSDREKKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Um tað er tekin um góðar tíðir, ella tað bara er ein ábending um, at føroyingar drekka meiri, skal ikki gitast um. Ein sannroynd er í hvussu er, at sølan av rúsdrekka er munandi økt í fjør í mun til árið fyri.

Talan er um vøkstur í bæði nøgd og krónum. Hagtalsuppgerðin var ikki liðug í morgun, men tað stendur í hvussu er fast, at mongu nýggju ølsløgini, sum Rúsan byrjaði at bjóða sínum kundum í heyst, gav ølsøluni eitt øgiligt lop upp eftir.

Sum nevnt vóru hagtølini ikki heilt klár í morgun, men har vóru greiðar ábendingar um, at innan øl, vín eins væl og sterkaru løgirnar var talan um økta sølu.

Væntadi hava vit fleiri og meiri ítøkilig tøl við í blaðnum í morgin.



*Introduktiónin av fleiri nýggjum útlendskum ølsløgum skapti eitt øgiligt lop í ølsøluni*